# TÚ OG STJØRNURNAR

Planet.fo bjóðar nú øllum føroyingum at senda inn myndir av sær og kendum persónum. Hevur tú hitt ein kendan tónleikara, sjónleikara, politikarar, fótbóltsspælara ella onkran anna, so kanst tú senda okkum myndina og lata okkum síggja teg og stjørnuna.

Tær fyrstu myndirnar eru komnar inn, og her á síðuni síggjast nakrar av teimum. Vit koma við fleiri seinni.

Hevur tú hug at lata lesarar hjá Planet.fo síggja tína mynd, kanst tú senda hana til planet@sosialurin.fo.

Tað ber eisini til at senda við vanligum posti: Sosialurin, Boks 76, 110 Tórshavn. Merk brævbjálvan Planet.fo.

Tað ber eisini til at senda myndir umvegis heimasíðuna Planet.fo



*Arni Zachariassen var í Finnlandi og spældi við I AM í fjør, og tá ið teir skuldu skifta flúgvara, komu teir at bíða í nakrar tímar í Helsinki. Har rendu teir seg inn helst fittasta finlendingin í heiminum, Mumi-trøllið. Arni var skjótur í vendingini og fekk eina mynd av sær og Mumi. – Mumi var eyðmjúkur og niðri á jørðini og ikki nøkur diva, sum man kanska kundi hildið, so kendur sum hann er. Hann er faktiskt akkurát líka sum í filmunum, super kul og fittur, sigur Arni*



*Elsbeth Bech býr í Søldafirði, og hon hitti í summar írsku poppstjørnuna Brian McFadden. Tey vóru umborð á Dúgvuni á veg til Klaksvíkar, tá ið pápi Elsbet fór at práta við McFadden. Hann skrivaði autograf til Elsbet, og tey vóru sjálvsagt eisini avmyndað saman. – Tað var ógvuliga cool, sigur hon.*



*Jógvan og Jukka, sum er trummuspælari í finska bólkinum Nightwish. Teir hittust til afterparty á The Rock í Keypmannahavn í síðstu viku.*

## Loos vísir seg fram



Rebecca Loos, sum er serliga kend sum kvinnan, sum David Beckham fjasaðist við, ger alt fyri at vera frammi. Hon hevur tikið lut í ymsum reality-sendingum, síðani hon fekk sekkin sum hjálparfólk hjá Beckham, tí hon hjálpti við ov nógvum. Nú ætlar hon at gera ein nýggjan álmanakka, sum skal vísa meira enn vanligt av Rebeccu Loos. Hon hevur funnið saman við umstrídda myndamanninum Alison Jackson fyri at taka tær 12 avbjóðandi myndirnar. Tað sigst, at ein maður, sum líkist David Beckham, skal vera við á myndunum.

## Matt Damon fekk egna song



Sjónleikarin Matt Damon gramdi seg í bløðunum, at hann hevði so nógv at gera, at hann mátti verða á ferð alla tíðina. Hann segði, at hann kendi tað, sum at hann onga song átti sjálvur. Hetta fekk sjónleikaran Jennifer Love Hewitt at keypa eina song og senda hana til Matt Damon. Love Hewitt sendi eina heilsan við songini, men hann svaraði henni ikki. Tey hittust einaferð herfyri, og tá hugdi Matt Damon bara eitt sindur undarliga efir henni.

## Nýggj filmsrøð um fótbólt



10. september hevði filmurin Goal heimspremieru í USA. Filmurin er tann fyrsti í eini røð av trimum filmum, sum snýr seg um ein ungan fótbóltsspælara í USA, sum fer til Newcastle at spæla, roynir seg í Real Madrid og endar aftur á meksikanska landsliðnum. Høvuðsleiklutin hevur Kuno Becker, meðan amerikanski leikstjórin Danny Cannon hevur stjórnað filminum. Hann sigur, at munurin millum hendan og allar aðrar fótbóltsfilmar er, at hesaferð hava tað endiliga verið nógvir pengar at gera filmin fyri. FIFA er við í verkætlanini og vónar, at filmurin kann gera fótbóltsspælið enn meira populert kring heimin. Filmurin verður frumsýndur í Havnar Bio fríggjakvøldið.


